Sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkusstjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Tórfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Jústinus Eidesgaard

Útgevari, uppsetning og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr.: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Ein sigur fyri okkum øll

Oddagrein

HVØR skuldi trúð tí! At ein av heimsins størstu fyritøkum skuldi boyggja seg fyri trýstinum frá Palleba. Tí tað var einki minni enn óttin fyri, hvat teir einstøku kundarnir fóru at gera, um Shell søkti Brent Spar, sum fekk fyritøkuna at sleppa ætlan síni. Sjálvandi eigur Greenpeace høvuðsleiklutin í hesum leiki og tøkkina fyri, at Shell kúvendi. Men heldur enn at rópa hurrá fyri hesum felagsskapi eiga vit at frøðast um ta sannroynd, at hesaferð vóru tað ikki bert umhvørvisfólk, men tað vóru stjórnir, ráðharrar og ikki minst maðurin á gøtuni, sum fingu Shell at broyta áskoðan.

HETTA er vert at hava í huganum, tí er tað nakað, sum tørvur er á, tá talan er um í framtíðini at forða fyri dálking av jarðarknøtti okkara, so er tað eini sameining av virknum umhvørvisfólki, manninum á gøtuni og so teimum myndugleikum og stjórnum, sum vara av.

HÓAST Shell átti at kent sína vitjanartíð og ongantíð valt at koyra slíkt burturkast í havið, so taka vit kortini hattin av fyri fyritøkuni, tí hon við hesi avgerð í veruleikanum hevur slóðað fyri einum nýggjum politikki á umhvørvisøkinum. Hon hevur skapt precendens - fordømi - fyri nøkrum komandi og í tí liggur - beint tvørturímóti óttanum fyri precedens við at søkkja pallin - at oljufyritøkur sum aðrar fyritøku í framtíðini fara at umhugsa seg fleiri ferðir, áðrenn tær velja at brúka havsins botn til køst.

GÆVIÐ at hetta einastandandi høvið nú varð brúkt til at sameina kreftirnar móti tí dálking, sum fer fram alla staðni kring heimin. Her verður ikki minst hugsað um fyrrverandi kommunistiska heimin. Hvussu nógv munnu ikki russar hava dálkað høvini á norðaru hálvu! Tað er m.a. her herjast má á so ella so. Tó at tað má sannast, at hetta er ikki nøkur lætt uppgáva.

NÚ Brent Spar ikki verður søktur eru tað helst mong - eisini føroyingar - ið sita og rista við høvdinum. Tað kunnu vera siglandi føroyingar, sum siggja Brent Spar tangan sum eina bagatell móti allari tí dálking, sum dagliga fer í havið, eitt nú frá oljuflutningi.Og tað kunnu vera tey, sum minnast skipini við dálkandi farmi, sum vórðu søkt undir krígnum og eftir kríggið. Tað er helst rætt. Men spurningurin er ikki so einfaldur. Málið er meira av psykologiskum týdningi eitt nú fyri tey mongu, sum gera sítt til at forða dálkingini av náttúruni sum heild. Og at múgvandi vesturheimurin gongur undan, tá tað snýr seg um ikki at bruka høvini til køst. Og fyri føroyingar átti tað at verið ein sjálvfylgja, at vit øll vóru ímóti hesi dumping, nú vit liva av havinum. Hon hevði bert verið byrjanin. Nú er punktum sett fyri hesum med alla. Fáur kann fegnast sum vit.

Sosialurin

viðmerking

Viðmerking:

Nær kemur túrurin hjá vanliga føroyinginum – Edmund

Yvirskriftin kom í huga mín, nú vit hósdagin farna frættu, at enn einari av ódugnaligu leiðslum okkara hevði eydnast at fáa milliónapart av skuld lyfta av herðum sínum yvir á herðanar á skuldartyngda føroyinginum.

Sami spurningur kom mangan fram fyri meg áður enn núverandi løgmaður tók róður í hond, og aftur og aftur vónaði man, at hetta var eindømi, at nú fóru teir at venda hjálpina til tann einstaka líðandi borgarin, men nei.

Ein av hesum ferðum var t.d., tá okkum knappliga var álagt at bera byrðina av einum ørvitisparkeringshúsi í Havn. Og neyvan gloyma vit dagarnar, tá vit øll við eitt, uttan at verða eftirspurd, vórðu noyd at yvirtaka fylgjurnar av skilaleysa vinnulívs- og bankapolitikkinum, ið varð førdur í einamest 80'unum.

Tað var á heysti í '92, men nú skriva vit juni 95, hava nýggja leiðslu, men enn er sama lagið.

Góði Edmund!

9 mðr. eru farnir síðani tú tók róðrið í hond. Spurning ur mín er tann einfaldi: nær verður hjálpandi hondin rætt vanliga føroyinginum?

Tá vit á sinni samraddust um samgonguskjalið fyrsta, var eg spentur – vit vildu øll nakað nýtt! Tí gjørdist vónbrotið tað størri, tá tú valdi at halda fram í gomlu sporum farnu samgongunnar.

Enn størri gjørdist vónbrotið, tá tit, í staðin fyri at taka upp grundleggjandi samráðingar við danir um framtíð okkara her heima, endaðu fyrsta prát tykkara eftir (sigst) knøppum 3 tímum, og skrivaðu undir skjal, sum var betur óskrivað.

Ikki skilti eg teg heldur, tá tú í december lat teir broyta skattastigan, uttan at teim lægstløntu varð veittur minsti lættin.

Tað neit mær fast.

Enn minni skilti eg, tá tú sum oddamaður samgongunnar lat teir prioritera bilsølurnar framum.

Tó enn er tíð at broyta kós.

Mangt, mangt annað frá farnu 9 mánaðunum kundi verið ført fram í dag, nú tit stuðla teir "garpar", sum fyri 2 árum síðani "stjólu" flakavirki eftir flakavirki frá eisini vanligum føroyingum og bedýraðu, at nú teir gomlu ódugnaligu føroyingarnir (cit. Tummas Arabo) blivu skiftir út við tað unga ættarliðið, nú skuldi alt blóma.

Syrgiliga úrslitið teirra siggja vit á hvørjum tanga.

Men at tit einaferð enn leggja skuld teirra á hoyknandi herðar óseka einstaka føroyingsins – tað fær meg aftur at spyrja teg: **Nær venda tit tykkum til vanliga føroyingin við tí hjálp honum tørvar?**

Lat meg tó gera greitt!

Hóast passivu støðu tína, Edmund, ja eisini hóast beinleiðis mistøk tíni, so havi eg enn álit á tær bæði sum Løgmann okkara og sum menniskja. Tí vildi tað glett meg, og mong, mong við mær, um tú vildi givið eina frágreiðing, og svara spurningunum – **nær, nær kemur túrurin til vanliga føroyingin, hann sum dagliga stríðist fyri seg og síni, og vónar?**

Vinarligast
Jenis av Rana
Løgtingsmaður

Lesarabrøv

Regnskabsfusk eller hvad?

Billedet af denne maskine er taget på en lille plads i Danmark.

Det kunne være skæg at se regnskabet for denne maskine, er der nogen som tør stå frem?

Til oplysning kan jeg bemærke følgende nypris ca. 1 million.

Solgt på aktion for 30.000

Venligst
P. M.

DANNY TRANSPORT
– tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 19192

Hjálp
Ungt par við einum barni søkir íbúð beinanvegin. Helst 3 verilsir. Má vera í Havn. Max. 3000,- v/ljós og hita.
Tlf. 19194

Tað er fyrst og fremst innsatsurin hjá Greenpeace í Brent Spar-málinum, ið hevur ført við sær, at Shell bakkaði fyri trýstinum og gjørdi at ikki at søkkja oljugoymslupallin kortini. Nú er likt til, at Brent Spar endar inni á einum norskum firði, har hann skal takast sundur og burturbeinast. Á myndini royna mótmælisfólk frá Greenpeace at koma sær umborð á Brent Spar, men vatnkanonirnar umborð á supply-bátinum forða teimum í hesum.
Mynd SIFO

Greenpeace heiðurin fyri at Shell bakkaði

Eftir at Greenpeace gjørdi vart við ætlanirnar hjá Shell um at søkkja olugoymslupallin Brent Spar, raknaðu øll hini við, og fleiri stjórnir mótmæltu so harðliga, at hægsta Shell-leiðslan kendi seg noydda at sleppa ætlanunum. Hóast umhvørvisfelagsskapurin ikki frammanundan hevur verið væl umtóktur her á landi, má staðfestast, at hann eigur æruna fyri at málið endaði, sum tað gjørdi

Týskvøldið bakkaði Shell umsíður. Tá kom ein kunngerð frá tí stóra bretska-hollendska oljufelagnum um, at oljugoymslupallurin Brent Spar kortini ikki verður søktur í Atlantshavið, sum ætlanin annars hevur verið.

Fyrst og fremst hevur tað verið umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace, ið hevur gjørt sítt til at kunna um hesar ætlanir, umframt at hesin felagsskapur eisini hevur verið í gongd við fleiri mótmælistiltøkum, ið øll hava havt í hyggju at fáa Shell at broyta hugsan og sleppa sínum ætlanum um at søkkja oljugoymslupallin.

Hesin innsatsur hjá Greenpeace hevur vakt miklan ansrunt um í Europa, og ikki minst í grannalondunum hjá Bretlandi.

Ikki hevur Greenpeace altíð verið tann best umtókti felagsskapurin millum føroyingar, men ikki er ov nógv avgjørt, at tað er innsatsurin frá júst Greenpeace, ið hevur fingið øll eygu at vent sær móti málinum.

Søkja nú um burturbeining uppi á landi

Sambært kunngerðini frá Shell týskvøldið, fer felagið nú at søkja bretsku myndugleikarnar um loyvi at taka pallin sundur og goyma hava hann á landi.

Men hóast hesa kuvending í málinum, sigur Shell seg framvegis vera av teirri fatan, at tað hevði verið tann besta loysnin – sæð út frá einum umhvørvisverndar sjónarhorni - um Brent Spar varð søktur á djúpum vatni. Men Shell sigur seg eisini verða komið í eina keðiliga støðu í hesum máli.

Týskvøldið vísti sjónvarpsrásin BBC at siga, at orsøkin til, at Shell bakkaði, var tað stóra og alsamt vaksandi trýstið, ið fleiri av hinum londunum í Europa løgdu á felagið.

Sosialurin hevur alla tíðina fylgt við málinum, og ábendingar vóru í blaðnum í gjárum, at okkurt var í ferð við at henda í málinum.

Heðin Kyrjarheygg, ið er maskinsjefur á supply-bátinum Kronbas, segði við Sosialin í gjár, at kósin hjá Brent Spar var broytt, og at vónleyst var at siga, hvar stóri oljugoymslupallurin fór at verða søktur.

Vistu ikki hví kósin varð broytt

Teir umborð á Kronbas vistu ikki, hví sleipibátarnir høvdu broytt kós, men tað kann benda á, at Shell meira ella minni longu tá hevði tikið støðu í málinum, og at avgerðin um at bakka fyri stóra trýstinum tá longu varð tikin.

Sosialurin tosaði á middegi týsdagin í telefonini við Heðin Kyrjarheygg umborð á Kronbas, og tá vóru teir staddir á 59 stigum norður og 9 vestur – tveir fjórðingar frá Brent Star og sleipibátunum.

Greenpeace-skipið Altair hevði tá akkurát roynt at sloppið sær fram við Kronbas, fyri at koma at pallinum, men Kronbas sigldi fyri og forðaði hesum.

Eisini tá Greenpeace týsmorgunin við tyrlu setti tveir mans aftrat niður á Brent Spar, royndu supply bátarnir at forða fyri hesum. Teir sprændu við vatnkanónunum yvir Brent Spar, men kortini eydnaðist tyrluni hjá Greenpeace at fáa menninar niður á oljugoymslupallin í øllum góðum.

Tilsamans fýra mótmælisfólk hevði Greenpeace sett umborð á Brent Spar. Ein breti og ein týskari vórðu settir á pallin fríggjadagin og týsmorgunin komu so ein dani og ein íri aftrat umborð. Við sær á pallinum høvdu teir proviant til fleiri dagar.

Brent Spar endar kanska í Noregi

Seint týskvøldið váttaði norski ídnaðarmálaráðharrin Jens Stoltenberg fyri norska blaðnum VG, at samráðingar hava verið millum norsku stjórnina, Shell og hollendska oljumálaráðharran um, at norska stjórnin hevur sagt seg vera sinnaða at Brent Spar verður sleipaður inn á ein norskan fjørð.

Hesar samráðingar hava verið loyniligar, og tær fóru í gongd sunnukvøldið, tá hollendski oljumálaráðharrin og Shell settu seg í samband við norsku stjórnina.

Svarið frá norðmonnum var, at teir vóru áhugaðir í at taka Brent Spar inn á ein norskan fjørð, um tað kundi føra við sær, at gjørligt var at sleppa undan at søkkja oljugoyslupallin.

Hildið verður, at tað er einasta loysnin, at sleipa pallin til Noregs, um sleppast skal undan at søkkja hann. Tað tykist í hvussu er verða torført at finna aðra loysn enn hesa, og norðmenn hava so sagt seg verða sinnaðar at taka móti pallinum – tó við ávísum treytum. Eitt nú verður hetta bert gjørt, um avgjørt eingir aðrir møguleikar finnast fyri burturbeining.

Tað tekur einar fýra ella fimm dagar at sleipa Brent Spar til Noregs, og sambært VG skal norska stjórnin nú finna fram til eina skjóta loysn í framhaldandi samráðingum næstu dagarnar við hollendska oljumálaráðharran og Shell.

hj.

Noreg er næst á skránni

Neyvan hava sjógvarnir lagt seg viðvíkjandi stríðnum av oljugoymslupallinum, áðrenn alt bendir á, at eitt líknandi slag kann væntast um ikki so langa tíð.

Norsku myndugleikarnir eru komnir í ræsshaft av, at fleiri óbrúktir pallar standa í Norðsjónum, tí ikki er greitt hvussu sleppast skal av við teir. Og tey komandi átta árini verður helst neyðugt at rigga einar fimtan pallar av, tí brúk er ikki fyri teimum longur.

Ónkursvegna skulu hesir fyribeinast, men við gongdini í Brent Spar-málinum í huga, fáa norðmenn stórar trupulleikar, um teir ætla at nýta sama framferðarhátt. Í hvussu er hevur deildin hjá Greenpeace í Noregi lovað, at stór mótmælistiltøk fara at verða sett í verk, um norðmenn bara so mikið sum koma fram við tankanum um at søkkja pallar.

Norska stortingið hevur longu havt trupulleikan til viðgerðar, og har er samtykt, at hvørt mál viðvíkjandi burturbeining av pallum skal viðgerast fyri seg.

Annars siga metingar, at um allir teir norsku pallarnir, ið ikki eru í brúki longur ella sum í næstum koma í tá støðuna, skulu beinast burtur, fer tað at kosta einar 35-40 milliardir krónur. Verður alt burturbeint úr Norðsjónum, verður roknað við, at hetta lættliga kann koma at kosta væl meira enn hesar milliardirnar.

Fyrsta burturbeiningin er longu farin fram. Tað var Nordøst Frigg, har funnið varð fram til eina millumloysn, so betingfundamentið varð søkt, meðan restin varð upphøgd á landi.

Næsta málið av hesum slag í Noregi er Odin-pallurin hjá Esso Norge, ið órvað fer at skapa størri ósing enn Brent Spar-málið.

hj.